## Seta prís á sjálvstýrið

Í Grønlandi eru er arbeiðsgevarafelagið farið undir eina kanning, sum skal vísa, hvat tað fer at kosta grønlendska samfelagnum at fáa sjálvstýri og seinni fullveldi. Fyrst verður staðfest, hvat krevst av einum sjálvstøðugum samfelagi í dag, og so verður roknað út, hvat tað hevði kostað Grønlandi. Formaðurin í arbeiðsgevarafelagnum, Henrik Sørensen, sigur við KNR, at tað er neyðugt hjá tí almenna at leggja langtíðarætlanir, og tí er kanningin neyðug. Ætlanin er, at úrslitið verður greitt um einar fýra mánaðir.

## Danir snýta í skatti

Bæði einstaklingar og feløg snýta í skatti, og alt fleiri verða meldað fyri skattasvik. Í fjør sendi danska skatavaldið løgregluni 610 mál um svik við skatti og meirvirðisgjaldi, og tað var tvær ferðir so nógv sum árið fyri, skrivar Politiken. Jens Christiansen hjá skattavaldinum sigur við blaðið, at talan er bæði um mál við smáum upphæddum og mál, har fyritøkur hava svikað fyri milliónir. Skattavaldið sigur, at tað ger meiri við at leita eftir sviki í vinnugreinum, har møguleikin fyri at finna svik er størri enn aðrastaðni.

SKAT

# 60.000 fólk sur



- Tað verður neyvan størri enn hetta, segði ovurhonds fegna Linda eftir frálíku framførslu sína í gjárkvøldið

Mynd: Polfoto

**Ung og eldri, føroyingar og danir stuðlaðu Lindu og sungu saman við henni, tá hon saman við Muhamed og Alien Beat Club fyltu Ráðhúsplássið í Keypmannahavn við 60.000 áhoyrarum**

X-FACTOR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Ráðhúsplássið, Keypmannahavn:** Finalan nærkast av álvara. Kappingin, sum umleið tvær milliónir hyggjarar hava fylgt á DR1 hvørt fríggjakvøld seinastu vikurnar, er um at vera av. Stóra slagið verður um tríggjar dagar. Tá fellur avgerðin, hvørt tað verður Alien Beat Club, Muhamed ella Linda, ið vinnur X-Factor 2009.

Í gjárkvøldið varð hitað upp til stóra finalukvøldið. 60.000 áhoyrarar bíðaðu spentir, tá klokkan gjørdist sjey. Longu klokkan fýra vóru eini 1000 fólk savnað á Ráðhúsplássinum, so bestu plássini frammanfyri stóra pallin fóru tíðliga.

Hesi 1000 fólkini komu tó at bíða í nærum hálvan fjórða tíma, tí klokkan nærkaðist hálvgum átta, áðrenn fjøldin fekk stjørnurnar at síggja og hoyra.

Hoyra er tó kanska í so nógv sagt, tí fyrstu sekundini av fyrsta lagnum hjá Alien Beat Club hoyrdist røddin hjá sangarunum als ikki, og tað var ikki fyrr enn, at Linda og Muhamed høvdu verið á pallinum eisini, at ljóðið á sjálvum Ráðhúsplássinum kom ordiliga upp á pláss. Heima í stovunum kring land og ríkið – skilst – at ljóðið ongantíð var nakað at reypa av.

Á Ráðhúsplássinum sveik myndin á stórskýggjanum eisini fyrstu løtuna av konsertini, so mongu børnini og hálvvaksnu ungdómarnir høvdu serstakliga trupult at síggja, hvussu leikur fór fram á sjálvum pallinum.

### Sum á ólavsøku

Tað ráddi eisini um at vera vakin og ikki spilla tíðina, meðan luttakararnir vóru á pallinum. Tveir sangir hvør og eitt felagseykanummar. Tilsamans ein lítil hálvur tími av tónleiki var tað, ið borðreitt varð við.

Hetta halda danskir fjølmiðlar lítið um. Millum annað spyr ummælarin hjá Ekstra Bladet, um tað yvirhøvir ber til at kalla tiltakið, sum sjónvarpsrásin DR1 og útvarpsrásin P4 í felag skipaðu fyri, fyri eina konsert?

Hesum vóru teir flestu av teimum 60.000 áhoyrarunum á Ráðhúsplássinum tó samdir um, at tað væl bar til. Lagið var av tí besta. Onkur av føroysku áhoyrarunum helt speiskliga fyri, at tað var sum á ólavsøku, og sipaði helst til miðnáttarsangin á Vaglinum í Havn, tá fólk, eins og á Ráðhúsplássinum í gjárkvøldið, stóðu so tætt, at tað hvørki bar til at koma til høgru ella vinstru.

Fjøldin var enn tá so stór, at fyrireikararnir komu fram á pallin stutt undan konsertin byrjaði og heittu á fólk, um at trína eitt fet aftur, so at tað ikki gjørdist ov trongt hjá teimum, ið stóðu heilt frammi undir pallinum.

### Linda var best

Beint áðrenn luttakararnir fóru á pallin, segði Linda við Aftenshowet hjá DR1, at hon var eitt sindur uppi